**From:** Jacobsen,Súni Schwartz (Eik Banki) <ssj@eik.fo>
**Sent:** Friday, May 20, 2016 11:08 AM
**To:** Jan Lamhauge
**Subject:** Re: 3 uppfylgjandi spurningar

Hey Jan,

Vísandi til okkara notat frá 17. mai 2016, so meta vit, at vit hava givið nøktandi og fullfíggjað svar.

Eik Banki hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið.

Súni Schwartz Jacobsen
Sent from my iPad

On 19-05-2016, at 06:05, Jan Lamhauge <janl@kvf.fo> wrote:

Góði Súni,

Eg havi hesar uppfylgjandi spurningarnar.

Til 8: Tú skrivar *"TAKS hevur fingið avrit av báðum notatum frá grannskoðara bankans. Bæði notatinum frá 2013 og notatinum frá 2014"*.
Nær fekk TAKS hetta?

Til 9. TAKS spyr tykkum í apríl 2014 um eina uppgerð av handilsvirðinum á ognum og skyldum i samband við yvirtøkuna av virkseminum hjá Eik, herundir møguligt goodwill. Tit svara við at vísa á ein "preliminary opening balance sheet". Hví brúka tit virðisásetingina frá einum fyribils byrjunarjavna og ikki virðisásetingina í endaliga byrjunarjavnanum? Tað var jú ikki gjørd nøkur virðismeting í samband við yvirtøkuna, meðan ein uppgerð var gjørd til byrjunarjavnan. Hví so vísa á preliminary opening balance sheet?

Til 11: Tú umrøður (eitt nú til spurning 5) avhendingaravtaluna frá 30. sep 2010, sum eina avtalu millum "tveir óheftir partir". Júst hetta við, um talan er um ein handil millum tveir sjálvstøðugar partar, eru ósemjur um. Hvat metur Niels Winther-Sørensen um hendan spurningin?

--

Tað hevði verið sera gott, um tú kundi skriva nakrar reglur um hesar spurningar eisini. Tí teir verða helst viðgjørdir í sendingini.

vh Jan

**Disclaimer:** This message is confidential. If you have received it by mistake, please let us know by e-mail reply and delete it from your system as soon as possible; you may not copy this message or disclose its contents to anyone. Since the integrity and security of this message cannot be guaranteed on the Internet, Eik Banki P/F does not conclude any binding agreement with another party by e-mail. Warning: Although Eik Banki P/F has taken reasonable precautions to ensure no viruses are present in this e-mail, the company cannot accept responsibility for any loss or damage arising from the use of this e-mail or attachments.

Avrit frá kvf.fo